

# Samkomublaðið fyri apríl

# 2015



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar





www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Páskagleðin brennur ikki út!

*Pauli Høj*

Tað falna menniskjað kom av falli Adams. Tað nýggja menniskjað kom við upprisna Jesusi.
Og hetta eru tey góðu týðindi fyri øll menniskju ídag. Vit kunnu koma innaftur, har samfelagið við Gud okkara, skapar himins og jarðar, kemur aftur í rætt lag.
Tað merkir ikki, at vit sleppa undan sorg, sjúku og aðrari mótstøðu. Men at vit kunnu uppliva Hann, sum gevur alla ta hjálp, vit hava brúk fyri, so vit kunna koma sigrandi ígjøgnum lívið heilt til ein dag, har vit koma til staðið, har eingin sjúka, sorg er meira.

Páskirnar lýsa Guds fullkomnu náði. Í Ef. 2, 8-9 stendur, at av náði eru vit frelst!

Langifríggjadagur peikar okkum á dagin, tá ið Jesus fór til ákæran/deyðan og rindaði skuldina fyri teg og meg. Jesus var tann einasti, sum hevði ráð at gjalda okkara skuld. Hann átti dekning fyri skuldarbrævið hjá menniskjanum, tær og mær, tí Hann var rættvísur.

Lærisveinarnir hjá Jesus vistu ikki, hvat úrslitið fór at verða aftaná Jesu deyða á krossinum. Jú, Jesus hevði roynt at fyrireikað teir, men tá ið man sær teirra reaksjón hendan dagin, ikki minst hjá Pæturi, so høvdu teir ikki heilt skilt tað til fulnar, men aftaná skiltu teir.

Vit, sum halda páskir, kunnu fara inn í hesa høgtíð við vitan um, hvat úrslitið er. Vit minna okkum á tað, sum hendi, nevniliga, at her bleiv skuldarbræv menniskjans goldið av einum rættvísum manni. Hann bleiv gjørdur til synd fyri okkum, og vit, sum vóru skuldarar, blivu skuldarfrí.

Tað verður ofta sagt, at tað, sum vit fáa lætt, ganga vit ofta lætt um, virða tað ikki so nógv. Tað síggja vit serlga á børnum, sum fáa ting so lætt ídag. Tey stríðast ikki fyri tí, sum nógv av okkum gjørdu fyrr.

Tað er tí, vit mugu aftur til byrjanina, koma til krossin, tí tá blívur okkara yvirgevilsi ektað, og vil tað tá ávirka meira alt okkara lív, bæði hvussu vit síggja lívið hjá okkum sjálvum og øðrum. Eisini duga vit betur at umbera, fyrigeva og geva kærleika, tí vit síggja støðuna frá einum øðrum sjónarhorni.

Luk 7, 47:"… Men tann, ið lítið verður fyrigivið, elskar lítið" men honum, ið fær nógv fyrigivið, elskar nógv.. Tó so fáa øll mennisjku líka nógv fyrigivið, men henda kvinnan, ið talað verður um her, sá tað betur, tí hon skilti sína støðu uttan Jesus.

David sigur í Sálmi 51:".. geva mær aftur gleði um frelsu mína" Sagt við við øðrum orðum, so hevði hann mist frelsugleðina, tí eygu hansara vóru farin av leið. Hann bleiv upptikin av skeivum tingum.

Jú, tað eru tey, sum eru dottin á vegnum, myndaliga talað, liggja kanska í grøvuni á báðum síðum, og tú kennur teg mislukkaðan og sigur, at tað er eingin vón fyri meg. Soleiðis hevði Pætur tað eisni, tá hann avnoktaði Jesus beint áðrenn krossfestingina. Hann hevði lovað Jesusi, at hann aldri skuldi svíkja, men tað fyrsta, Jesus gjørdi eftir uppreisnina, var at leita Pætur uppaftur.

**Luk 4, 18-19"… at bera fangum boð um, at teir skulu sleppa leysir, og blindum, at tey skula fáa sjón, at gerða kúgað frí,"**

# Skrá fyri apríl

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 30. mars | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 31. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Skírishósdagur | 2. apríl | kl. 18.00: | Møti við Tummas Jacobsen (barnamøti er eisini) |
| Langifríggjadagur | 3. apríl | kl. 10.30: | Møti við Sunnivu Poulsen og Jastrid Høj |
| | | kl. 18.00: | Møti við Paula Høj (barnamøti er eisini) |
| | | kl. 21.30: | AWAKE við Steve Everett |
| Leygardagur | 4. apríl | kl. 11.00: | Seminar um islam og kristnitrúgv. Høgni Johannesen og Rúni Rasmussen hava hvør sín fyrilestur |
| | | kl. 17.00: | Familjumøti. Klovnurin Bubu vitjar. |
| | | kl. 20.30: | AWAKE Praise. Aftaná er kafékvøld |
| Páskadagur | 5. apríl | kl. 11.00: | Møti við Ólavi Jacobsen |
| | | kl. 18.00: | Møti við Pola Jacobsen. Møtið verður teknmálstulkað. (barnamøti er eisini) |
| | | kl. 21.30: | Á sanganna veingjum |
| 2. páskadagur | 6. apríl | kl. 10.30: | Møti við Bergi Debes Joensen og Símun P. Jacobsen |
| | | kl. 18.00: | Møti við Jóhan Petur Johannesen (barnamøti er eisini) |
| Leygardagur | 11. apríl | kl. 21.00: | AWAKE við Búgva V. Olsen |
| Sunnudagur | 12. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva V. Olsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 13. apríl | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 14. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 15. apríl | kl. 19.30: | Moses Hansen (DK) |
| Leygardagur | 18. apríl | kl. 21.00: | AWAKE við Kartin Høgnesen |
| Sunnudagur | 19. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við Jeff Fountain (sí meira undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 20. apríl | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 21. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 25. apríl | kl. 21.00: | AWAKE við Jóhan Petur Johannesen |
| Sunnudagur | 26. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 27. apríl | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 28. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 2. mai | kl. 21.00: | AWAKE við David Hudson |
| Sunnudagur | 3. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti Henning Schikora |

# Lýsingar

**Stóra páskastevnan í Kelduni**
Í døgunum 2. – 6. apríl verður stóra páskastevnan hildin í Kelduni.
Latum okkum gera okkum klár til at tæna landi og fólki okkara við hesi stevnu. Les skránna og um fjølbroyttu tiltøkini á keldan.fo.

**Fleiri útlendskar vitjanir**
Vit koma at hava fleiri møtir við útlendskum gestum í apríl og mei. Sí skránna í blaðnum.

**Kaféterian opin mikukvøld**
Frá 15. apríl kemur kaféterian aftur  at vera opin hvørt mikukvøld frá  kl. 17.00-21.00.
Møguleiki verður at keypa ymiskt til matna. Hetta kvøldið er væl egnað til ymisk tiltøk.

**Jeff Fountain vitjar**
Trúboðarin Jeff Fountain vitjar í Føroyum í døgunum 18. til 25. apríl. Jeff fer at tala á morgunmøtinum 19. apríl.  Eisini at halda fleiri fyrilestrar. Jeff hevur í nógv ár granskað evropiska søgu og mentan. Hann leggur í sínum arbeiði sera stóran dent á, tað besta fyri Evropa er at halda fast við tann kristna arvin. Og eisini hevur hann ein boðskap um, at tað er vón fyri Evropa. Sí meira um ymisku tiltøkini á Facebook.com/jeffvitjar.



## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584